Álit

í

løgtingsmáli nr. 31/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Broytt tillagað starv, nýggj javning o.a.)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 30. september 2020, og eftir 1. viðgerð 8. oktober 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. oktober og 3. og 24. november 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri MEGD saman við Sinnisbata, Javna og Diabetesfelagnum, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Michael Feldballe, Regin Berg, Sosialráðgevarafelagið, Fakfelagssamstarvið saman við Samtaki, og við landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur saman við Almannaverkinum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Uni Rasmussen, Edva Jacobsen, Erhard Joensen og Jóhan Eli Poulsen) hevur soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 11 verður § 22, stk. 3 orðað soleiðis:
   "*Stk. 3.* Hægsta lønarískoyti verður veitt, tá arbeiðsgevari rindar 2.000 kr. um mánaðin í løn. Lønarískoytið verður lækkað við 30% av inntøku frá arbeiðsgevaranum oman fyri upphæddina á 2.000 kr. og upp til og við 15.000 kr. Lønarískoytið verður lækkað við 50% av inntøku frá arbeiðsgevaranum oman fyri upphæddina á 15.000 kr."
2. Í § 2, stk. 2 verður 2. pkt. orðað soleiðis:
   "Tó verður áseting og eftirlit í sambandi við tillagað starv framt eftir ásetingunum í § 23, stk. 2 og 3, og lønarískoytið kann ikki vera hægri enn 19.900 kr. um mánaðin."

Viðmerkingar:
Til nr. 1:
Í upprunauppskotinum verður lønarískoytið lækkað við 40% av inntøku frá arbeiðsgevaranum oman fyri upphæddina á 2.000 kr.
Men við hesum broytingaruppskoti verður lønarískoytið lækkað í tveimum stigum. Tá inntøkan er oman fyri 2.000 kr. og upp til og við 15.000 kr. um mánaðin, verður lønarískoytið lækkað við 30%. Tá inntøkan er oman fyri 15.000 kr. um mánaðin, verður lønarískoytið lækkað við 50%.
Í upprunauppskotinum stendur, at fyrsta árið væntast sparingin fyri landskassan leysliga mett at blíva 500 tús. kr.

Við at gera hesa broyting verður sparingin fyri landskassan í 2021 leysliga mett at blíva 350-400 tús. kr. í staðin. Sparingin fyri landskassan økist við tíðini.

Til nr. 2:
Sbrt. skiftisregluni í § 2, stk. 2 í upprunauppskotinum, verður mest loyvda lønarískoyti ásett til 19.900 kr. Soleiðis sum ásetingin er orðað, fevnir hon eisini um vard størv. At ásetingin í § 2, stk. 2 eisini skal fevna um vard størv, hevur ikki verið ætlanin og er heldur ikki viðgjørt í almennu- ella serligu viðmerkingunum.
Skipanin við tillagaðum størvum, sum kom í gildi í 2013, loysti av vard størv, men tey, sum tá vóru í vardum starvi, kundu halda fram við óbroyttum treytum. Enn eru umleið 50 persónar í vardum starvi. Um so er, at ásetingin um 19.900 kr. eisini fer at fevna um vard størv, eru einstakir persónar, sum fara at missa meira enn 2.100 kr. um mánaðin.
Við hesi broyting verður mest loyvda lønarískoyti á 19.900 kr. ikki galdandi fyri vard størv.

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Hervør Pálsdóttir og Aksel V. Johannesen) mælir staðiliga frá at samtykkja uppskotið við hesum viðmerkingum:

Minnilutin kann á ongan hátt góðtaka, at umstøðurnar hjá fólki við skerdum førleika verða gjørdar so nógv verri.

Málið er sera principielt. Kjarnin í málinum er, um vit skulu fara frá, at fólk, sum bera brek- og ella hava skerdan arbeiðsførleika, skulu hava løn sambært sáttmála, ella um tey í mesta lagi kunnu forvinna tað, sum ein arbeiðsmannaløn er.
Lógaruppskotið vísti á, at ongin í tillagaðum starvi fór at koma at liggja undir einari arbeiðaraløn. Seinni er tó komið fram, at tað ikki er rætt. Fleiri fara at liggja undir arbeiðaralønina.
Frameftir verður lønarparturin frá arbeiðsgevara sambært sáttmála og lønarískoytið frá landinum at rokna sum ein veiting. Hetta merkir í veruleikanum, at inntøkan hjá fólki í tillagaðum starvi kann broytast við løgtingslóg á hvørjum ári. Tað er als ikki nøktandi.
Tað snýr seg eisini um hugburð til fólk við breki ella skerdum førleika. Sjálvsagt skulu fólk í tillagaðum starvi hava góðar umstøður og góð kor á arbeiðsmarknaðinum. Og Løgtingið átti at gingið á odda fyri at fingið enn fleiri fólk í tillagað starv. Týdningurin av at vera á arbeiðsmarknaðinum fyri trivnað og lívsgóðsku má ikki undirmetast.
Í 2009 samtykti Føroya Løgting ST-sáttmálan um rættindi hjá fólki, sum bera brek. Minnilutin er sannførdur um, at hetta lógaruppskot ikki er í samsvari við ST-sáttmálan. Eisini av teirri orsøk eigur Løgtingið ikki at samtykkja uppskotið.
Lyklahugtøk í ST-sáttmálanum eru javnvirði, bannan av mismuni vegna brek, samhaldsfesti og kompensatión.
Breksáttmálin byggir á eina menniskjafatan, har virðingin fyri tí einstaka menniskjanum og møguleikarnir hjá hvørjum einstøkum skulu geva treytaleyst somu javnbjóðis rættindi til øll. At forða fyri mismuni vegna brek av øllum slag, og at samfelagið tryggjar øllum borgarum, sum bera brek, javnbjóðis rættindi at liva og virka í samfelagnum á jøvnum føti við øll onnur.
Tí var lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk eisini eitt nýbrot tá ið hon kom í 2013. Lógin gjørdi upp við, at fólk við breki ella niðursettum arbeiðsførleika aloftast vóru uttan fyri arbeiðsmarknaðin og fingu fyritíðarpensjón í staðin. Nú kom møguleikin fyri at gera ein rúmligan arbeiðsmarknað, har fólk við skerdum arbeiðsførleika í nógv størri mun kundu koma á arbeiðsmarknaðin. Tað var positivt og

einmælt samtykt í Løgtinginum. Og vit fegnaðust øll um møguleikan og sóu tað sum eitt stórt framstig.
Tað, sum landsstýrið nú leggur upp til er, at fólk við breki ikki skulu hava løn sambært útbúgving, akkurát sum øll onnur, tá ið tað snýr seg um lønarpartin hjá landinum. Í spurningum, sum nevndin hevur sett landsstýrismanninum, gongur eisini greitt fram, at landsstýrið ikki sær lønarpartin hjá landinum sum løn, men sum eina veiting. Minnilutin metir lønarpartin frá landinum sum kompensatión fyri skerda førleikan, sum ST-sáttmálin eisini leggur upp til. Tí eru vit ikki samd við meirilutanum í Trivnaðarnevndini og síggja hetta uppskot, sum um at mismunur verður lóggivin.
Vit stúra fyri avleiðingunum av uppskotinum. Eitt er tað fíggjarliga, sum vit ikki taka undir við. Hin parturin er hugburðurin til fólk við skerdum førleika á arbeiðsmarknaðinum. Lógarbroytingin eggjar ikki fólki við skerdum arbeiðsførleika at útbúgva og førleikamenna seg, sum annars er grundleggjandi fyri øll onnur á arbeiðsmarknaðinum og grundleggjandi fyri at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Tað menniskjaliga virðið í at kenna seg til nyttu í samfelagnum, at hava nakað at fara upp til, og skapa sær ein meiningsfullan gerandisdag, er fyri flest fólk besta bót til eitt eydnusamt meiningsfult lív. Minnilutin metir, at lógarbroytingin økir um vandan fyri, at fleiri fólk fara at blíva fyritíðarpensjónistar heldur enn at fara í tillagað starv.
Fólk, sum eru í tillagaðum starvi í dag fara at merkja broytingina beinanvegin við tað, at lønarískoytið frá landinum minkar. Og tey, sum koma í skipanina frameftir, fáa nógv verri kor enn tey, sum eru í skipanini í dag. Um eitt fólk í tillagaðum starvi skiftir starv, so kemur viðkomandi undir tær verru treytirnar. Tískil kunnu nøkur fólk fáa sera trupult við at skifta starv. Og samstundis letur lógarbroytingin upp fyri, at tvey fólk við sama skerda arbeiðsførleika á sama arbeiðsplássi fara at fáa sera ymiska inntøku, um annar er í nýggju skipanini og hin í gomlu skipanini. Princippið um somu løn fyri sama arbeiði verður brotið.
Allar tær mongu hoyringarnar í Trivnaðarnevndini hava mælt Løgtinginum frá at fremja hesa lógarbroyting. Tað er einans landsstýrið, sum ynskir broytingina.
Minnilutin er sera harmur um broytingina og kann als ikki góðtaka mátan, landsstýrið fer við teimum, sum onkursvegna eru við skerdan lut í samfelagnum.
So samanumtikið: vit mangla eina sosialpolitiska kós. Tá ið aðalmálið ikki er at hjálpa teimum, sum hava minst, so fáa vit eitt veikari samfelag.

Minnilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 1. desember 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Edva Jacobsen

Jóhan Eli Poulsen

Erhard Joensen